## Gunnar bíðar eftir Hughes

Nú bíðar føroyski Gunnar Nielsen nú eftir einum sáttmálaútspæli frá Mark Hughes og Blackburn. Gunnar vandi við enska felagnum í farnu viku, og har gekst rættiliga væl. – Beint nú bíða vit eftir eini afturmelding frá Mark Hughes. Eg veit ikki, hvat tað verður til, men felagnum og venjaranum dámdu í øllum førum tað, sum teir sóu, sigur Barry Silkman, sum umboðar Blackburn í møguliga handlinum. Føroyski umboðsmaðurin hjá Gunnari er Jákup í Stórustovu.

## Ferguson vil hava álop



Í kvøld spæla Milan og Manchester United sína seinnu hálvfinalu í Champions League. Enska oddaliðið vann heimadystin 3-2, men tað fær ikki venjaran at tosa um verjuspæl í Milan. – Vit gera hvørki okkum ella viðhaldsfólkunum eina tænastu við at grava okkum niður. Vit vilja spæla upp á okkara egna máta, og so mugu antin vinna ella tapa. Vit mugu jú rokna við, at teir helst fáa okkurt málið, og so eru vit eisini noyddir at skora, sigur Sir Alex Ferguson.

# Niclas og Guri tóku tað mesta

**Tað var bara í blandaðum tvímansleikí, at sterkastu føroysku badmintonkortini ikki tóku gullið**

BADMINTON

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Saman við borðtennis og judo skipaði badminton um vikuskiftið fyri sínum FM-kappingum. Her gjørdust tað ikki óvæntað Guri Poulsen og Niclas Eysturoy, sum tóku tað mesta – tó at tey so sanniliga máttu stríðast fyri heiðrinum.

Tey bæði vunnu nevnliga kappingarnar í einmansleiki, og eisini í tvímansleiki fingu tey gullið saman við ávíkavist Brynhild D. Carlsson og Hilmar Kass Jacobsen.

Í blandaðum tvímansleiki gekk tó ikki. Her máttu tey bæði nevnliga lúta fyri Bjørg Djurhuus og Aksel Poulsen í finaluni.

Úrslitini frá kappingini vóru hesi:

**Tvímansleikur, kvinnur:**
1 Brynhild D. Carlsson, HBF
og Guri Poulsen, HBF
2 Lis Hansen, VÍF
og Fjóla Luid, HBF.

**Tvímansleikur, menn:**
1 Niclas Eysturoy, HBF
og Hilmar Kass Jacobsen, HBF
2 Flóvin S. Mikkelsen, HBF
og Rógvi Poulsen, HBF

**Blandaður tvímansleiku:**
1 Bjørg Djurhhus, HBF
og Aksel Poulsen, HBF
2 Guri Poulsen, HBF
og Niclas Eysturoy, HBF

**Einmansleikur, kvinnur:**
1 Guri Poulsen, HBF
2 Brynhild Carlsson, HBF

**Einmansleikur, menn:**
1 Niclas Eysturoy, HBF
2 Aksel Poulsen, HBF




*Annað árið á rað vann Niclas Eysturoy gullið í einstaklingakappingini fyri menn*
*Mynd: Sofus D. Johannesen*

# 12 judomeistarar funnir

Føroyameistarakappingin í judo fyri einstaklingar var um vikuskiftið. Bæði gentur, dreingir, nýbyrjaði, roynd og vaksin kappaðust. Kappast var í vektflokkum og tilsamans 12 føroyameistarar vórðu funnir. Eitt samlað yvirlit yvir teir sæst her á síðunum. Harnæst varð sokallaða "Fighter-steypið" latið tí unglingi, sum undir kappingini sýnir besta teknikk og størsta kampvilja. Í ár var tað Ernst D. Remmel úr Havnar Judofelag, sum fekk hetta.



*Børn opin bólkur: Frá vinstru: Maria í Kálvalíð, SJF, Fríði Atlasson, HJF, Ernst D. Remmel, HJF og Fríði Dam, SJF*



*Menn opin bólkur: Frá vinstru: Petur Sigurð Johannesen, SJF, Jógvan Páll Kristiansen, SJF, Búgvi Poulsen, HJF og Skarpheðin Njálsson, HJF.*

**Dreingir –42 kg., nýbyrjaði**
1. Jordi Berg Dalsgarð, HJF
2. Teitur Johannesen, HJF
3. Egil Joensen, HJF

**Dreingir –48 kg., nýbyrjaði**
1. Fríði Dam, SJF
2. Leo Johannesen Mohr, HJF
3. Gestur Ákason, HJF

**Gentur –38 kg., nýbyrjaði**
1. Sanna Gunnarstein, HJF
2. Valdis Lützen Gunnarsdóttir, HJF
3. Eva Kjell Hansen, HJF

**Gentur –55 kg., nýbyrjaði**
1. Maria í Kálvalíð, SJF
2. Linda Andreasen, HJF
3. Hervør Lützen Ólavsdóttir, HJF
4. Linda Fossá, HJF

**Dreingir –32 kg., roynd**
1. Gorm Nesborg, HJF
2. Eskild Nesborg, HJF
3. Tórður Áslaksson, SJF

**Dreingir –35 kg., roynd**
1. Aksel D. Remmel, HJF
2. Jón Højgaard, SJF
3. Carsten Joensen, SJF

**Børn –42 kg., roynd**
1. Ernst D. Remmel, HJF
2. Dánjal Dalbø, SJF
3. Pólina Kjærbæk, SJF
4. Alex Joensen, SJF

**Børn –55 kg., roynd**
1. Inga D. Remmel, HJF
2. Fríði Atlasson, HJF
3. Pætur Jákupsson, HJF

**Børn opin bólkur:**
1. Fríði Atlasson, HJF
2. Maria í Kálvalíð, SJF
3. Fríði Dam, SJF
og Ernst D. Remmel, HJF

**Menn –73 kg.**
1. Benny Ejdesgaard, HJF
2. Jógvan Páll Kristiansen, SJF
3. Hendrik Johannesen, HJF

**Menn +73 kg.**
1. Búgvi Poulsen, HJF
2. Hjalmar Johannesen, SJF
3. Áki Davidsen, HJF

**Menn opin bólkur:**
1. Skarpheðin Njálsson, HJF
2. Búgvi Poulsen, HJF
3. Petur Sigurð Johannesen, SJF
og Jógvan Páll Kristiansen, SJF